KÍ-VB:

# Marek skal lyfta VB

**Tað verður Marek Vierzbicki, sum skal lyfta VB úr naggatódini, og fyrsta mótstøðan verður frá fyrrverandi liðfeløgunum úr KÍ**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Sum nevnt aðrastaðni í blaðnum, so varðdragan Kovacevic loystur frá venjarastarvinum hjá VB hósdagin, og hóskvøldið fundaðust leiðsla og leikarar í VB-húsinum, og endin varð, at Marek Vierzbicki í fyrstu atløgu skal standa við ábyrgdini av besta VB-liðnum.



*Tað verður Marek Viersbicki, sum fer at standa við ábyrgdini av VB-liðnum, og fyrsta uppgávan verður móti fyrrverandi liðfeløgunum úr KÍ*

### Á gamlar gøtur

Marek er ikki nakar ársungi í føroyskum fótbólti. Hæddarpunktinum her á landi náddi hann ivaleyst, tá hann í 1999 var við til at gera KÍ til meistarar, og lagnan vil tað nú soleiðis, at tað verður ímóti júst KÍ, at hann skal royna seg sum venjara fyri fyrstu ferð.

Hvussu hetta fer at hepnast, kann bert tíðin vísa, men tað tykist í øllum førum greitt, at nýggi venjarin hevur mest sum allar mans tøkar til uppgávuna. Einasta undantakið er Gisli Sveinbjørnsson, sum hevur ein skaða í fótliðinum at dragast við. Heldur ikki Robert Cieslewicz hevur vant hesa vikuna. Hann fekk skað, tá VB tapti fyri B68, men tað verður í øllum førum vónað, at tað fer at bera til hjá honum at spæla hósdagin.

Hinvegin eru Tórður Holm, Jón Pauli Olsen og Birgir Jørgensen nú allir tøkir aftur, eftir at teir høvdu gjørt av ikki at spæla undir fyrrverandi venjaranum. Ivaleyst verða teir onkursvegna við í hópinum sunnudagin, men tað hevur verið so sum so við dystarvenjing hjá teimum, og tí er í øllum førum ósannlíkt, at teir allir fara at vera við frá fyrstas bríksli.

### Fáar broytingar

Eftir eina laka byrjan, har liðið bert fekk trý stig í fýra dystum, tykist KÍ nú veruliga at hava fótað sær í kappingini. Heimasigrarnir á EB/Streymi og Skála vóru kanska væntandi, men sigurin í Gøtu tykist veruliga hava lyft liðið, og nú krevja áskoðararnir enn trý stig, tá VB kemur norður.

Kurt Mørkøre hevur eisini mest sum allar sínar mans tøkar til dystin. Atli Danielsen, sum hevur verið ein sannur brandur í verjuni, er tó burturstaddur, men her líkist Jan Andreasen einum uppløgdum avloysara, eftir at hann tykist vera komin fyri seg eftir skaða.

Eisini Allan Mørkøre, sum var burturstaddur seinast, verður við hesaferð. Hann kemur tó ikki til landið fyrr enn leygardagin, og tí er ivasamt, um talan verður um eitt pláss millum teir fyrstu ellivu fyri hansara viðkomandi.

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 22.06 | EB/S-HB | Lassin Isaksen |
| 23.06 | TB-Skála | Birgir Sondum |
| 23.06 | KÍ-VB | Oddmar Andreasen |
| 23.06 | B36-GÍ | Jens Petur Brattalíð |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 22.06 | B71-ÍF | Georg Rasmussen |
| 22.06 | B36-NSÍ | Jón Kári Frederiksen |
| 22.06 | Sumba-FSV | Páll Augustinussen |
| 22.06 | ÍF-HB | Dia Lamhauge |
| 22.06 | KÍ-VB | Jonhard Hansen |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 23.06 | TB-AB | Poul Erik Jacobsen |
| 23.06 | B68-HB | Edvard Højgaard |
| 23.06 | B71-Royn | Johnn Krogh |
| 23.06 | B36-FSV | Eigil Olsen |
| 23.06 | GÍ-ÍF | Jákup M. Kjeld |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 23.06 | HB-B36 | Hans Eivind Olsen |
| 23.06 | KÍ-GÍ | Berint Andreasen |

**Inter-Toto cup**

| | |
|---|---|
| 22.06 | St. Gallen-B68 |

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál- munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 7 | 5 - 2 - 0 | 17 | 3 | 14 | 17 |
| 2 | NSÍ | 8 | 5 - 2 - 1 | 17 | 11 | 6 | 17 |
| 3 | B68 | 8 | 4 - 3 - 1 | 13 | 10 | 3 | 15 |
| 4 | B36 | 7 | 4 - 1 - 2 | 25 | 12 | 13 | 13 |
| 5 | KÍ | 7 | 4 - 0 - 3 | 20 | 11 | 9 | 12 |
| 6 | GÍ | 7 | 3 - 1 - 3 | 10 | 12 | -2 | 10 |
| 7 | VB | 7 | 2 - 2 - 3 | 4 | 5 | -1 | 8 |
| 8 | EB/ Streymur | 7 | 1 - 1 - 5 | 7 | 16 | -9 | 4 |
| 9 | TB | 7 | 1 - 1 - 5 | 6 | 27 | -21 | 4 |
| 10 | Skála | 7 | 0 - 1 - 6 | 3 | 15 | -12 | 1 |

## Støðan, 2. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál- munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FS V | 7 | 5 - 1 - 1 | 25 | 6 | 19 | 16 |
| 2 | Sumba | 7 | 4 - 2 - 1 | 11 | 7 | 4 | 14 |
| 3 | ÍF | 7 | 4 - 1 - 2 | 20 | 8 | 12 | 13 |
| 4 | LÍF | 7 | 4 - 0 - 3 | 14 | 11 | 3 | 12 |
| 5 | KÍ | 7 | 2 - 3 - 2 | 11 | 13 | -2 | 9 |
| 6 | B71 | 7 | 2 - 2 - 3 | 6 | 5 | 1 | 8 |
| 7 | B36 | 6 | 2 - 2 - 2 | 8 | 13 | -5 | 8 |
| 8 | HB | 7 | 2 - 1 - 4 | 9 | 12 | -3 | 7 |
| 9 | NSÍ | 7 | 2 - 0 - 5 | 4 | 12 | -8 | 6 |
| 10 | VB | 6 | 1 - 0 - 5 | 3 | 24 | -21 | 3 |

B36-GÍ:

# Hava ikki ráð at missa

**Tað er um at vera seinasta útkall hjá GÍ, um teir skulu blanda seg í heiðursmerkjastríðið hetta kappingarárið**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Seinasta tíggjuáraskeiðið ella gott og væl tað, hevur GÍ átt ein fastan sess í føroyska fótbóltsoddinum.

Ivaleyst høvdu gøtufólk eisini vónað, at soleiðis skuldi verða í ár, men veruleikin hevur higartil verið ein annar. Somikið nógv stendur nú á, at megna teir ikki at fáa stig við sær úr Havnini, so er vandi fyri, at sambandið upp til europeisku sessirnar verður heilt burtur, og hetta vilja gøtumenn neyvan lata fara framvið, soleiðis uttan víðari.

Ein partur av frágreiðingini upp á laku úrslitini hevur uttan iva verið, at GÍ hevur verið rakt av skaðum, og tá hópurin ikki er hin breiðasti í landinum, so raka hesir meint.

Nú røkist tó fyri, at flestu leikararnir eru um at vera klárir, og einasti leikarin, sum við vissu ikki verður við hesaferð er langtíðarskaddi Krzystof Popczynski. Bartal Eliasen noyddist av vøllinum við skaða fyri viku síðani, og er heldur ivasamur, men hann plagar at treiskast, og tí kann roknast við, at hann verður við frá fyrsta bríksli.

Hjá B36 hevur talan somuleiðis verið um heilt fitt av skaðum í ár, men eisini hjá teimum tykist nú at ganga rætta vegin.

Serstakliga hevur hetta rakt miðvøllin, men nú røkist fyri, at Klæmint Matras, Din Sandu og Julian Florescu allir eru tøkir aftur. Klæmint spældi annars eisini við seinasta vikuskiftið.

Og eins og hjá GÍ, so hevur B36 heldur ikki ráð at missa nakað serligt av stigum afturat, um teir skulu gera sær vónir um ein sess í oddinum. Higartil hevur liðið mist seks stig á heimavølli, so har eru neyvan ráð at missa fleiri.



*Hvørki B36 ella GÍ hava higartil staðið seg eins væl sum í fjør, og nú eru ikki ráð at missa fleiri stig, um heiðursmerki skulu røkkast*



TB-Skála:

# Lagnudagur á Sevmýri

**Bæði í TB og á Skála ásanna teir, at teir ikki hava ráð at tapa botndystin, har nervarnir ivaleyst fara at hava stóran týdning**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*



*Fagnaðurin var stórur, tá Skála tryggjaði sær uppflyting til bestu deildina. Sunnudagin er alneyðugt við minst einum stigi, um sessurin eisini skal varðveitast til komandi kappingarár*

Ivaleyst tann mest spennandi av teimum fýra landskappingardystunum í bestu deildini, sum eru á skránni í vikuskiftinum, er tann, sum í morgin verður á Sevmýri.

Skála hevur ongan dystin vunnið. TB hevur vunnið ein. Tað var í fyrsta umfarinum á Sevmýri ímóti VB. Úrslitið var 1–0 til heimaliðið. Síðani hevur TB bara fingið eitt stig – í heimadystinum ímóti EB-/Streymi.

– Eg rokni við, at tað liðið, sum fer at hava betri tak á nervunum, fer at hava góðan møguleika at vinna. Tað eru bara trý lið, sum kappast fyri at sleppa undan botnplássinum og harvið beinleiðis niðurflyting. Tí hava innanhýsis uppgerðirnar so sera stóran týdning, og hetta er kanska tann dysturin, sum fyri hesi bæði feløgini er tann, sum hevur størst týdning av øllum.

Tað sigur Lynge Nielsen. Hann hevur seinastu tvær vikurnar verið venjari á Tvøroyri. Hann ásannar, at setningurin hjá honum og spælarunum verður fyrst og fremst at halda tørn og at stríðast fyri at varðveita plássið í bestu deildini.

– Eg má bara ásanna, at fyritreytirnar, sum vit hava arbeitt út frá, hava ikki verið góðar. Tað fer at koma væl við, tá vit fáa frí frá kappingini, men talan verður ikki um nakran stórvegis steðg frá venjingini. Tað ber stutt sagt ikki til hjá okkum, sigur Lynge Nielsen.

Undan dystinum í morgin er tað greitt, at Andrass Nolsøe ikki verður tøkur, og tað er sera ivasamt, um jugoslavarnir báðir, Nebosjé og Vladimir, verða førir fyri at spæla. Teir dragast allir við skaðar.

### Óvissa um nýggju menninar

Í gjár skrivaðu vit, at tríggir spælarar úr Rumenia eru komnir til Skála. Ætlanin er, at teir skulu spæla við á Tvøroyri. Um tað skal bera til, so skulu øll tey formligu viðurskiftini vera komin upp á pláss.

Tá vit tosaðu við Ísak Mikladal, aðalskrivara í FSF, vóru øll viðurskiftini ikki komin upp á pláss, men spæliloyvini hjá í hvussu so er tveimum spælarum vóru komin úr Rumenia.

– Vit hava á síðu 94 í skipanini greitt sett upp, hvat tað skal syrgjast fyri, áðrenn útlendskur spælari fær loyvi at spæla. Viðurskiftini hjá Skála við útlandið eru komin upp á pláss. Men tað stendur eisini, at loyvisbrævið verður ikki útskrivað fyrrenn avvarandi felag í Føroyum hevur sent FSF váttan frá føroyska fólkayvirlitinum um, at viðkomandi leikari er búsitandi í Føroyum. Hetta yvirlitið er ikki komið til okkara, og fyrrenn tað er komið, verða loyvini ikki útskrivað, sigur Ísak Mikladal. Hetta var í fyrrakvøldið, og FSF aðalskrivarin dugdi ikki at síggja forðingar fyri, at fremmandu menninir kundu spæla í morgin, um omanfyri nevndu viðurskiftini komu upp á pláss fríggjadagin.

EB/Streymur-HB:

# Stevnudystur móti oddaliðið

**Sundalagsstevna er um vikuskiftið, og partur av hesari verður leygarkvøldið, tá lokala liðið skal takast við oddaliðið úr Havn**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað er ikki sørt, at spenningurin í samansetta felagnum er stórur, nú teir rigga til stevnudyst móti HB. Bæði tí talan er um sanna styrkisroynd móti í løtuni sterkasta liðnum í landinum, men so avgjørt eisini, tí EB/Streymur vil sleppa at vaska stórtapið frá undanfarna vikuskifti av sær.

Tann dystin spældu teir blá/svørtu upp til sítt besta fyrstu trý korterini, og megna teir at leingja tað løtuna hesaferð, so er einki at ivast í, at teir vera sera truplir hjá HB at syfta.

Tað er tó ein vansi, at pólendingurin, Andrzej Pacek, neyvan verður tøkur til dystin móti HB. Stinni verjuleikarin fekk ein snudd í beinið fyri tveimum vikum síðani, og skaðin bara versnaði, tá hann so eisini spældi við seinsta vikuskiftið.

Annars verður roknað við, at allir mans eru tøkir hjá Trygva Mortensen, sum soleiðis ikki er noyddur at gera tær heilt stóru broytingarnar.

### 16 á rað

Tað verður venjarin hjá HB, Ion Geolgau, neyvan heldur noyddur at gera.

Verður sæð burtur frá teimum báðum, Halli Danielsen og Una Arge, sum báðir hava verið skaddir í eina tíð, so hevur HB somu mans tøkar, sum vóru við á Skála. Eisini Jón Róa Jacobsen, sum annars hevur havt onkran minni skaða at dragast við.

Og tað er neyvan orsøk at vænta, at venjarin fer at fremja tær heilt stóru broytingarnar. Fyrst og fremst tí hetta ikki plagar at liggja honum serliga nær, men eisini tí HB í ár hevur sýnt sera støðug avrik. Dysturin móti Skála fyri viku síðani var 16. dysturin hjá liðnum í kappingarhøpi í ár, og enn hava teir ikki roynt at fara av vøllinum sum taparar.

Tað ætla teir sær neyvan heldur hesaferð. Trý stig afturat eru í eygsjón, og verða hesi fingin til høldar, økist munurin í oddinum eisini, tá hitt oddaliðið, NSÍ, hevur frí hetta vikuskiftið.



*Talan verður um stevnudyst, tá HB vitjar á Eiði leygardagin, so ivaleyst er nógv fólk væntandi til dystin*

## Soleiðis plagar at ganga

Enn hevur HB fingið fulla úrtøku, hvørja ferð teir hava vitjað á Eiði, og KÍ hevur aloftast havt sera gott tak á VB, tá teir hava vitjað í Klaksvík, tó at talan í flestu førum hevur verið um sera tættar uppgerðir.

Hagtølini siga okkum eisini, at B36 seinnu árini hevur havt eitt sera gott tak á GÍ í Gundadali.

Talavn niðanfyri sýnir, hvussu hevur gingist, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í bestu deildini seinastu tíggju árini. Viðmerkjast skal, at dysturin, B68-NSÍ, av røttum átti at verið leiktur hetta umfarið, men hann varð framskundaður orskaað av Inter-Toto luttøkuni hjá B68.

| | '01 | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| EB/S-HB | 0-4 | - | - | - | - | - | - | 0-3 | - | - | 0-0-2 | 0-7 |
| TB-Skála | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |
| B68-NSÍ | 2-1 | 2-0 | 0-0 | 3-2 | 0-2 | - | 4-1 | 3-2 | - | 4-2 | 6-1-1 | 18-10 |
| KÍ-VB | 4-1 | 2-2 | 2-1 | 2-1 | 3-2 | 2-2 | 1-2 | - | 1-0 | 3-3 | 5-3-1 | 20-14 |
| B36-GÍ | 3-1 | 3-1 | 4-0 | 1-1 | 5-2 | 0-0 | 0-2 | 2-5 | 0-2 | 1-1 | 4-3-3 | 19-15 |